# Samgongan er so sára samd

HØGNI HOYDAL



**Hóast allir flokkar í samgonguni látast vera ósamdir, so er alt spæl fyri gallarínum. Samgongan er so sára samd um at verða sitandi og ongan politikk at føra. Og hon er sára samd um at niðurlaga vælferðina, seta lóg og rætt til viks, máa alt álit burtur á okkum sjálv og skapa andstygd fyri politikki**

Í Løgtinginum hava leiðandi politikararnir í landsstýrinum sum einasta aftursvar til lemjandi atfinningarnar frá Tjóðveldi og øðrum (ið hava verið síðani 2004, tá ABC kom til valdið), at "tjóðveldisfólk eru frustrerað".

Og tað er púra rætt. Hetta er helst tað einasta, ið samgongufólk siga í løtuni, sum er í samsvari við sannleikan. Víst eru vit ørkymlað í Tjóðveldi um politisku støðuna. Fyri bara at taka nøkur mál úr rúgvuni:

- ABC-flokkarnir hava uppá bara 6 ár megnað at oyðilagt búskapin og skapt risahall, hóast ávarað hevur verið ímóti teirra avgerðum og anarkiii frá byrjan.
- Teir hava miðvíst sett lógir og reglur til viks – og onki fær avleiðingar. Bara ólógligu meirnýtslurnar frá 2004 til 2008 kosta okkum nú hvørt ár 400 mió. á fíggjarlógini (og tað er helvtin av hallinum á fíggjarlógini).
- Bara skúladepilin í Suðuroy, har fullveldissamgongan samtykti at brúka 36 mió., tá hann byrjaði í Vági, hevur fyribils kostað 95 mió. eftir at hann partú skuldi flytast til Hovs, og verklagslógin er dyggiliga brotin.
- Bara seinasta hálvtannað árið hava ABC-flokkarnir lagt meira enn 50 lógaruppskot fyri tingið, sum ikki eru løgliga eftirkannað, soleiðis sum reglurnar fyriskriva. Hartil er meira enn 30 lógaruppskot løgd fram og samtykt við at bróta allar tíðarfreistir og tey hava rætt og slætt onga veruliga viðgerð fingið.
- Øll mál, ið hava við okkara framtíð og sjálvræði at gera, eru sett til viks og parkerað.
- Vantandi fiskivinnupolitikkurin hevur kostað okkum eina minking í avreiðingarvirðinum frá 2002 til 2008 uppá 600 mió. kr. - og talan er um milliardir í útflutningsvirði, sum eru mist hesi árini.

**ABC skal frelsa okkum frá ABC?**

Og nú siga somu flokkar, at teir skulu frelsa okkum frá teirra egna skeiva politikki. Og tað einasta teir hava borðreitt við, er ein miðvís og tilvildarlig gnaddan av rættindunum og møguleikunum hjá veikastu bólkunum í samfelagnum.

Vit í Tjóðveldi eru eisini djúpt ørkymlað, tí vit hava í veruleikanum hava so gylt høvi at leggja á annan bógv, um bara eitt minstamark av politiskari leiðslu og veiggi sleppur framat. Onki land í heiminum hevur so stórar møguleikar at fáa vent búskapargongdini, tí megnað vit tildømis ein fiskivinnureform, sum Tjóðveldi hevur skotið upp hesi seinastu mongu árini, kunnu vit økja um og broyta inntøkugrundarlagið heilt skjótt.

Mest ørkymlandi er kortini, at tað, sum heldur ABC-flokkarnar við valdið í løtuni, er at teir látast vera ósamdir og skiftast um at sleppa ókeypis framat í fjølmiðlunum at spæla vera í andstøðu til sínar egnu gerðir. Men onki fær avleiðingar og onki broytist. Tey málini, summi siga seg vera ímóti í dag, tey samtykkja somu fólk í morgin.

**Samdasta samgonga nakrantíð**

Sannleikin er jú, at samgongan er so sára samd:

- Hon er samd um at verða sitandi, so at einstøku politikararnir kunnu brúka sínar landsstýrisessir og nevndarformanssessir til at sleppa í fjølmiðlarnar at profilera seg sjálvar.
- ABC-samgongan er so sára samd um ongan politikk at hava, og tí eru allar hesar sokallaðu ósemjurnar reint spæl fyri gallarínum. Samgongufólk samtykkja, tá samanum kemur, okkurt neyðaregg eftir at hava spælt ósamd í tíðindunum nakrar mánaðar afturat.
- Og um pressan uppdagar og ger teimum greitt, hvat tey hava atkvøtt fyri, so fara tey bert aftur í fjølmiðlarnar at gartera móti sínum egnu avgerðum. Samtykt uppskot verða bara standandi, hóast tey ikki verða fylgd – eins og vit sóu við ólavsøkupakka, játtanarkørmum og øðrum. Og sum vit hava sæð við øllum fíggjarlógum hjá ABC, har lógarjáttanir ikki verða hildnar.
- Samgongan er so sára samd um at máa støðið undan vælferðini við Føroyum við sínum skilaleysa búskaparpolitikki og einføldu sparingum hjá teimum, ið hava minst orku at mótmæla, og sínum forðingum fyri øllum reformum.
- Samgongan er so sára samd um, at lógir og reglur eru til fyri at brótast og at onki skal fáa avleiðingar.
- Og samgongan er so sára samd um at skapa misálit á okkum sjálvi og okkara politisku skipan.

**Samd um stillstøðu og samband**

Og er nakað løgið í tí? Um tú ongan politikk og onga hugsjón hevur, so ber jú heldur ikki til at vera ósamd um hugsjónir og politikk. Um endamálið bert er verða sitandi og at onki skal henda, so er besti vegurin at skapa so nógv mistreysti á politisku skipanina, at fólk gevast at taka nakað í álvara, og koyra allar flokkar og politikarar í sama pott. Tí tá verður ongin broyting ella framtøk, og valdið kann býtast á skinninum handan tjøldini.

Hetta er eisini besti vegurin til framhaldandi samband. Skapa teir ótta millum fólk, so kann løgmaður sleppa at siga síni mótsigandi og meiningsleysu orð og ístaðin vísa til tann sonevnda "ríkisfelagsskapin", sum trygd móti sínum egnu gerðum og vantandi politikki.

**Øll alternativ eru betri enn hetta**

So jú. Tjóðveldið er sera ørkymlað og tekur djúpa frástøðu frá tí ruðulleika og ábyrgdarloysi, sum ABC er trygdin fyri at fremja.

Vit halda, at fyri hvønn minutt hendan samgongan situr, kostar tað pening, ábyrgd, moral og treysti fyri føroyska samfelagið og framtíðina.

Vit skilja ikki, hvussu føroyskir fjølmiðlar og viðmerkjarar kunnu endurtaka ógrundaða uppáhaldið hjá ABC-flokkunum um, at onki alternativ finst til teir. Í fyrsta lagi er alt annað eitt betri alternativ enn núsitandi meiningsloysið – enntá ein starvsstjórn av embætisfólki hevði verið frægari. Í øðrum lagi hevur Tjóðveldi støðugt lagt fram greið, ítøkilig alternativ og hugsjónarligt veiggj. Men hetta fær onki fjølmiðlapláss, tí samgongufólk higartil hava tikið allar teigar til sín dagliga sjónleik við at spæla ósamd..

**Nú er nóg mikið**

Men vit gevast sanniliga ikki, ella seta okkum upp afturá. Vit fara at koyra á og halda á. Í veruleikanum skulu bara 4 tingumboð flytast frá ABC-flokkunum til tess at bróta teirra krøking til valdið. Og verður bara ein partur av ljóskastaranum settur á, hvat í veruleikanum gongur fyri seg í ABC-tómgongdini, munnu fólk fara at siga: Nú er nóg mikið. Her krevst politikkur, hugsjón, leiðsla og konsekvensur í føroyskum stjórnmálum. Og sjálvandi fara vit at megna at reisa okkum og fáa vón og framtíðarsjón til at menna føroyska samfelagið úr truplum tíðum.

Eitt týdningarmikið ýtið hjá Tjóðveldi verður lagt fram á ting leygardagin 6. mars: Uppskot um fiskivinnureform og tilfeingismarknað.

# Fyri Vágarnar

ZAKARIAS WANG



Nøkur føra fram, at eg skrivi greinar um flogvallarútbyggingina av tí, at eg vil gera teimum skaða, sum búgva í Sørvági og øðrum bygdum í Vágum.. Ført verður fram, at eg ikki unni teimum at hava flogvøll og vil taka arbeiðspláss frá teimum.

So er ikki.

Sjálvt um tað vísir seg, at ein nýtiligur flogvøllur ikki kann gerast í Vágoynni, fer tað at vera til fyrimun fyri tey sum búgva í Vágum at fáa ein nýggjan flogvøll.

Ein góður flogvøllur er heilt avgerandi fyri, at vit sum samfelag kunnu vera við í altjóða kapping um arbeiðspláss. Øll vit, sum her liva, hava áhuga í, at vit klára okkum væl í hesi kapping.

Fyri nøkrum árum síðani var upp á tal at fáa eitt virki í lag í Vágoynni, sum kom at krevja eini 200 fólk. Hetta kom ikki í lag, og ein av orsøkunum sigst at vera, at flogsambandið Føroya og útlandið millum var ov vøkkult. Kanska var hetta ein undanførsla, men tað kann vera, at tað var rætt, og tað vísir, hvat ið talan er um í hesum máli.

Tað, vit hava brúk fyri í hesum landi fyri at fáa vinnulívið at blóma, eru góðir samskiftismøguleikar bæði innanlands og við útlandið. Vit skulu hava atløgumøguleikar fyri stór skip og lendingarpláss fyri stór flogfør. Tá ið vinnulívið blómar, fer at bera til hjá enn fleiri fólkum at búgva her, og tað er aftur avgerandi fyri at vit kunnu hava eitt blómandi mentanarlív um alt landið.

Hetta er nakað, sum vit øll hava fyrimun av. Vit skulu minnast til, at stutt er millum bygdir okkara, og tí kunnu vit leggja fyritøkur allastaðni og fara til arbeiðis allastaðni. Hetta er nakað, sum eisini tey, sum búgva í Vágum, eins og tey sum vilja seta virki á stovn har, koma at hava almikið gagn av.

## HPV-koppseting:

# Gentur føddar í 93 og 94 mugu kvika sær

TÍÐINDASKRIV
*Krabbameinsfelagið*

Freistin at fáa ókeypis koppseting móti lívmóðurhálskrabba fyri gentur, sum eru føddar í 1993 og 1994, gongur út 1. juli í ár. Tí eiga hesar gentur, sum í dag eru 15, 16 og nakrar 17 ára gamlar, at kvika sær at lata seg koppa.

Allar gentur, sum eru føddar 1. januar 1995 ella seinni, og sum hava fylt 14 ár, verða koppaðar ókeypis fyri lívmóðurhálskrabbamein. Eftir galdandi reglunum skal koppsetingin verða liðug, áðrenn gentan fyllir 15 ár. Um ikki, má gentan sjálv gjalda fyri restina av viðgerðunum. Talan er um trý pirk, sum skulu setast við á leið tveimum mánaðum ímillum og innanfyri eitt ár.

Eitt serligt tilboð er í løtuni galdandi fyri gentur føddar í 1993 og 1994. Hesar kunnu eisini verða koppaðar fyri lívmóðurhálskrabbamein, men hetta tilboð er bert galdandi fram til 30. juni 2010. Gentur í hesum aldursbólki, sum ikki eru liðugt koppsettar tá, mugu sjálvar gjalda fyri partin av koppsetingini, sum restar í.

Krabbameinsfelagið heldur tað hava stóran týdning at fáa so nógvar gentur, sum til ber, at taka av tilboðnum um ókeypis koppseting. Koppanin er rættuliga kostnaðarmikil – hon kostar millum 3500 og 4000 kr – og tí kann prísurin í sjálvum sær forða summum í at fáa hesa verju.

Lívmóðurhálskrabbi er eitt sera vandamikið slag av krabbameini. Flestu tilburðirnir stava frá sonevndum Human Papillomavirus – stytt HPV. Koppsetingin verjir ímóti teimum báðum sløgunum av HPV-virus,sum elva til nógv teir flestu tilburðirnar av lívmóðurhálskrabba.

HPV eru ógvuliga vanlig virus, sum smitta lætt við kynsliga samveru. Koppseting fyri HPV-virus virkar best hjá teimum, sum ikki eru vorðin smittað, og tað merkir oftast innan ein gerst kynsliga virkin. Tí verður mælt øllum ungum gentum at lata seg koppseta – eisini teimum, sum ikki fáa ókeypis koppseting.